# TILTØK

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti.
Kl. 12.00 Sunnudagsskúlin byrjar aftur.
Kl. 18.00 Evangeliskur fundur. Heimasíða www.hebron.fo

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Juda ríki, frá Jóram til Jóash. Kl. 11.00 Gudstænasta Robert Svendsen.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Leygardagin kl. 11.00 Útifundur í gongugøtuni um viðrar.
Sunnudagin kl. 11.00 Møti. Kl. 17.00 Møti við Ekko frá Skótaleguni í Englandi í summar. Drekkamuður. Øll eru vælkomin.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Jacques Adams í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúlin byrjar aftur sunnudagin 25. august kl. 14.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti við Niels Jákup Nielsen.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangeliskt møti, kl. 21.00 Útimøti. Mikukvøldið kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17.00 Landsbøn. Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 16.00 Samkomufundur.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum (rætting frá blaðnum)**
Av misgáum hava vit lýst sunnudagsskúlan at vera byrjaðan. Men skulu gera vart við, at hann byrjar 1. sept.

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20.00 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og lovsangur. Kl. 18.00 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow, Sandoy**
Aglow møti verður í Samljóð leygardagin kl. 20.00 við vitjan úr Havn. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjadagin kl. 20.30 Vón fyri framman, við hugna, vitnisburði og sangi.
Leygardagin kl. 21.00 Opið hús við Osbjørn Joensen.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við Paula Høj, barnamøti kl. 11.00. Evangeliskt møti kl. 19.00 við Maibritt o.ø. Vælkomin í Kelduna www.keldan.fo

**Soli Deo Gloria**
Týskvøldið kl. 20.00 Sunnudagsskúlafundur (uppiá).
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Samkoman Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 byrjar sunnudagsskúlin aftur og kl. 18.00 er møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Vegna missiónsviku í Porkeri verður einki møti sunnukvøldið.

**Missiónshúsið í Porkeri**
Leygarkvøldið verður møti kl. 20.00 við Streingjakórinum á Glyvrum.
Sunnukvøldið kl. 18.00 verður útsendan av Maureen og Christopher Clarke. Í hesum sambandi luttaka streingjakórið á Glyvrum og manskórið úr Meinigheitshúsinum í Havn. Talari verður Leo Hans Mikkelsen. Innsavnan verður. Aftaná verður borðhald í skúlanum í Porkeri. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Onki møti vegna møti í Porkeri.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygarkvøldið kl. 20.00 Útimøti við Glasstovuna á Tvøroyri um viðrar.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangeliskt møti.

**Møti í Hirtshals**
Møti verður sunnudagin 25. august kl. 18.00 í Hirtshals missiónshús við sjómanstrúboðaranum Torleif Jóhannesen. Kaffi o.a. verður aftaná. Øll hjartaliga vælkomin.

**Frá felagnum Pinkubarnadeyði**
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
*Mánadagin 19. august:*
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-18 Kortspæl, telving, bobspæl, dart og onnur spøl Tilmelding til døugrðan mikudagin tlf. 316491
*Týsdagin 20. august:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Vit syngja, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Smáar gerandislýsingar fyri 600 árum síðani og frameftir. Ásmundur V. Johannesen
*Mikudagin 21. august:*
kl. 10-13 Matgerð
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur. Sjá skránna í bløðunum
*Hósdagin 22. august:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 23. august:*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 25. august verður farið niðan á Støðlafjall og Stórafjall (berjatúrur). Farið verður av Kunningarstovuni kl. 9.30. Havið heit og góð gonguklæði og matpakka við. Túrurin er miðal tungur. Tilmelding.

**Eysturoyar Gongufelag**
Gongutúrur verður sunnudagin 25. august niðan á Svartbakstind og Oknadalsskarð. Vit møtast við vegin norðanfyri rundkoyringina á veg oman til Norðskála kl. 14.00. Meiri fæst at vita á Kunningarstovunum í Eysturoynni tlf. 449449 (211449) og 444860 (225224).

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61655400.

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, Vingetoften 18, DK 2730 Herlev
Tú kanst eisini ringja til: tlf. 4484 2665 (Jón) mobil: 2443 0903 (Jón)
www.neozone.dk

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20.00-21 og 22.30-23.30.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærarabúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

**AA-Suðuroy/Vágur**
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
**Í august er skrivstovan bert opin mikudagar frá kl. 16-18.**
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Skrivstovan er stongd í summarfrítíðini. Opið verður aftur týsdagin 20. august 2002.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Tórhild,
e-mail: torhildm@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897,
e-mail: jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Íslandsvegur 10C, FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317373. Fartlf. 264839.
Faks: 310813.
t-postur: mbf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.mbf.fo

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

**Sinnisbati**
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur: sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Javni**
Skrivstovan er opin týsdag til fríggjadag kl. 10.00-14.00.
Adr.: Hoydalsvegur 40, 3. hædd.
Tlf. 314827 – fax 310557
Teldupostur: javni@post.olivant.fo
Heimasíðan www. javni.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Heilafelagið, MBF-húsið**
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 444796, Hallbjørg

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 317959, telefax 315727.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

## 80 ÁR

Leygardagin 24. august verður Hanna Hansen á Skælingi 80 ár. Dagurin verður hildin í heiminum hjá Anniku og Elva Joensen á Garðavegnum 8, í Søldarfirði frá kl. 17.00.

Leygardagin 24. august fyllir Ingibjørg Hentze á Argjum 80 ár. Tey, ið vilja heilsa uppá Ingibjørg, eru vælkomin inn á gólvið millum kl. 14 og 18.

## 90 ÁR

Í dag, 23. august verður Thurid Abrahamsen, Fuglafjørður, 90 ár. Føðingardagurin verður hildin hjá Poulinu og Jørleif, á Fjalsvegi 8, frá kl. 18.00-22.00.



# FILMSTEIGURIN

### The sweetest thing:
## Vakrar, sexutar og single…

Hvønn maður hevur ikki hug at vera tann útvaldi, tá Christina alter, ein útfordrandi, sexut single, sum upp á allar mátar líkist Cameron Diaz, jagstrar náttarinar útvalda? Og tað er sjálvandi Cameron Diaz, man kann uppliva í leiklutinum sum Christna í nýttja romantisku, sexutu komediuni, The Sweetest thing.

Christina Walters (Cameron Diaz) er ung, vøkur og sexut. Hon livur eitt lystugt lív saman við vinkonunum, Courtney Rockliffe (Christina Applegate) og Jane Burns (Selma Blair) og hevur ætlanir um at uppgeva tilveruna sum ung, frí og single. Hon fer ikki eftir tí rætta, hon fer eftir tí rætta júst nú. Men ein dagin hittir hon Peter (Thomas Jane) á einum diskoteki. Tann perfekti partnarin, tann fyrsti, hon er klár at binda seg til.

Ein perfekt singletilvera er klár at verða býtt um við eitt perfekt parforhold, til dreymamaðurin brádliga hvørvur sporleyst. Saman við bestu vinkonuni, Courtney, fer Christina út á eina desperata og komiska ferð fyri at finna mannin í lívi sínum. Ferðin førir tær at enda til eitt stórt yvirraskilsi og eina váttan uppá, at kærleikin hóast alt er, sum heiti filmsins sigur, »The Sweetest Thing«





## Spirit – Hesturin frá Cimarron

Tá Vesturheimurin enn var villur, varð eitt fyl føtt, sum fekk navnið Spirit. Fylið vaks upp og varð førarahestur við ábyrgd fyri trygdini hjá flokki sínum. Og hetta setti hann andlit til andlits við ein nýggjan vanda, sum trongdi inn í land hansara: Tann hvíti maðurin.

Møtið við menniskju og tamdar hesar endar ólukkuligt fyri Spirit, sum verður fangaður og síðani seldur til kavaleríið. Her royna teir at knekka tann stolta hestin, men Spirit stríðist ímóti, og vil ikki lata nakran ríða á sær. Eftir at hava kastað sjálvan obertin av saðlinum, eydnaðist tað honum við hjálp frá á sama hátt fangaða Lakota-indianaranum, Little Creek at rýma. Men eisini Little Creek vil temja hann – umenn við øðrum miðlum. Hjá indiánarunum hittir hann ryssuna Rain.

Men heldur ikki henda eydnan varir leingi. Indiánaralegan verður álopin av kavalarínum, og Spirit verður enn einaferð fangaður og nú tvungin til at arbeiða fyri jarnbreytina, sum treingir longur og longur inn í The Wild West, sum er heimið hjá Spirit. Men so lætt knekkar man ikki tann stolta hestin frá Cimarron…




Frumsýning
Fríggjadagin 23.08. kl. 17$^{00}$
Leygardagin 24.08. kl. 17$^{00}$
Sunnudagin 25.08. kl. 16$^{00}$

Billettprísur: 45,- kr.
Fríggjadagin 23.08. kl. 19$^{00}$
Leygardagin 24.08. kl. 19$^{00}$
Sunnudagin 25.08. kl. 18$^{00}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
Tlf. 31 19 56




Frumsýning
Fríggjadagin 23.08. kl. 21$^{00}$
Leygardagin 24.08. kl. 21$^{00}$
Sunnudagin 25.08. kl. 20$^{00}$

Fríggjadagin 23.08. kl. 23$^{15}$
Leygardagin 24.08. kl. 23$^{15}$
Sunnudagin 25.08. kl. 22$^{15}$




Fríggjadagin 23.08. kl. 18$^{15}$
Leygardagin 24.08. kl. 18$^{15}$
Sunnudagin 25.08. kl. 17$^{15}$

Fríggjadagin 23.08. kl. 20$^{30}$
Leygardagin 24.08. kl. 20$^{30}$
Sunnudagin 25.08. kl. 19$^{30}$




Fríggjadagin 23.08. kl. 22$^{45}$
Leygardagin 24.08. kl. 22$^{45}$
Sunnudagin 25.08. kl. 21$^{45}$

**KOMANDI FILMUR**




Frumsýning Fríggjadagin 30.08.